# Teir ætla ikki at standa aftanfyri tær

**Menninir umborð á Jarnbardi síggja ljóst upp á møguleikan at vinna FM, sum kvinnumanningin umborð á Jarnbardi tykist hava patent uppá, men sum menninir higartil ongantíð hava vunnið**



*Talan var um sera harða kapping í oddinum, men tað eydnaðist Jarnbardi at enda fremstir, og nú ætla teir ikki longur, at tað bara eru kvinnurnar, sum vinna við bláa bátinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

6-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Í kappingini millum 6-mannaførini við kvinnum gekk tað soleiðis leygardagin á Trongisvágsfirði, sum tað hevur gjørt í tveimum teimum undanfarnu kappingunum í ár, og sum tað gjørdi allar sjey ferðirnar í fjør. Jarnbardur var fyrstur á mál, og um tað eftir róðurin í Hósvík var nakar ivi um, at tað kanska fór at eydnast Riddaranum at hótta Knørra kvinnurnar, so svann tann ivi sum døgg fyri sól leygardagin. Jarnbardur setti alt og øll upp á pláss.

Og leygardagin fingu tey í Knørrafelagnum ein eykavinning, um tað ber til at siga tað soleiðis. Menninir umborð á Jarnbardi høvdu í kappingini í Klaksvík og í Hósvík vunnið næstfremsta plássið. Men munurin frá teimum og fram til Gongurólv, sum hevði fingið fult báðu ferðirnar, var minkaður. Í Klaksvík var hann hann fimm sekund, og í Hósvík var hann minni enn eitt sekund.

- Tað høvdu vit sjálvandi væl og virðiliga lagt til merkis, og vit høvdu undan róðrinum á Trongisvágsfirði góðar vónir um, at tað hesa ferð skuldi eydnast, og vit vóru hjartans fegnir um, at tað eydnaðist, sigur Erik Jespersen, sum er bátsformaður umborð á Jarnbardi. At hann sum róðursmaður hevur leiklutin at koyra undir hinar, hoyrist væl ella rættari illa!. Tí tað er ikki meiri, enn at tað gralar í honum, tá ið hann skal greiða frá sigursróðrinum, sum er tann fyrsti hjá manningini.

- Eingin ivi er um, at Gongurólvur er favorittur at vinna hvønn róður, og at hann tískil eisini er favorittur at vinna meistaraskapin. Tað halda vit, tí Gongurólvur hevur umleið somu manning, sum hann hevði í fjør. Bátarnir, sum hann kappaðist við, vóru Sundabáturin, Smyril og so Jarnbardur. Hesir tríggir bátarnir hava skift so at siga alla manningina út, og bæði í Klaksvík og í Hósvík vístu teir umborð á Gongurólvi seg sum teir stinnastu.

*Nær vart tú greiður yvir, at tit høvdu vunnið á teimum hesa ferð?*

- Vit vóru ikki greiðir yvir, at vit høvdu vunnið, tá ið vit fóru um málið. Vit høvdu Gongurólv undir liðini, og eg sá, at vit vóru frammanfyri hann. Men eg var ikki greiður yvir, um vit høvdu vunnið á Sølmundi. Hann hevði ógvuliga góðan endaspurt, og tá ið fjarstøðan til hansara var eitt sindur stór, var tað ikki so lætt at meta um, um vit høvdu vunnið á honum ella ikki. Men tað høvdu vit, og tú kanst ætla, at tað smakkaði okkum væl, tí hetta var fyrsti sigurin hjá okkum yvirhøvur, sigur Erik Jespersen.

Róðursmaðurin hevur áður verið umborð á 8-mannafarinum Knørri. Umframt hann er tað bara ein av hinum, sum áður hava roynt seg í kappróðri. Manningin, roknað av lærinum og fram á toftina, er henda: Eyvindur Niclason, Niclas Olsen, Rói Eysturdal, Rúni í Homrum, Rúni Johannesen og Johan Jacobsen. Ein er 27 ára gamalur, og allir hinir liggja millum 20 og 23 ára aldur.

*Hvussu ber tað til, at tað eydnaðist hjá tykkum hesa ferð?*

- Sum sagt so hildu vit, at gongdin í tveimum teimum fyrstu kappingunum bendi á, at tað kundi bera til. Hesa ferð mistu vit kanska tríggjar fjórðingar av einari bátslongd í startinum. Men vit fullu ikki í fátt. Tað gekk væl at vinna munin aftur, og so lógu vit allan vegin borð um borð og togaðust. Hetta var fyrsta ferðin í ár, at Gongurólvur hevur fingið sovorna mótstøðu í miðróðrinum, og í endaspurtinum vísti tað seg so, at vit vóru teir stinnaru, og tað fegnast vit um.

## FM dreymurin

Kvinnurnar umborð á Jarnbardi hava vunnið fleiri FM, og eingin ivi er um, at tær eisini í ár fara at vinna FM. Higartil hava tær vunnið átta FM heiti, og tær hava kós ímóti níggjunda meistaraskapinum. Við monnum hevur Jarnbardur ongantíð vunnið FM. Og stendur tað til bátsformannin og hansara menn, so skal nakað gerast við hetta.

- Gongurólvur hevur ikki vunnið FM síðani í 1996. Sjálvandi vilja teir fegnir gera nakað við tað, og vit halda framvegis, at teir eru favorittar at vinna hvønn róður og harvið FM. Men vit fara at gera tað, sum tað ber okkum til at gera, fyrst at vinna í Fuglafirði leygardagin. Um tað eydnast, so fara vit undan trimum teimum seinastu kappingunum at vera javnir við Gongurólv, og so verður alt púra opið og harvið ógvuliga spennandi, heldur Erik Jespersen.

Hóast talan er um nýggja manning, og hóast teir ikki hava luttikið í róðri áður, so hava teir umborð á Gongurólvi gjørt nógv við fyrireikingarnar.

- Vit fóru undir fyrireikingarnar stutt eftir ársskiftið. Tað gekk eitt sindur striltið fyrstu vikurnar, tí onkrir fóru av, men síðani mitt í februar hava vit havt hesa manningina, og tað smakkaði okkum óføra væl, tá ið vit leygardagin fingu boðini um, at vit høvdu vunnið.

## Kærdu Sundalagið

Sølmundur var ógvuliga væl við í kappingini á Trongisvágsfirði. Eina løtu vóru teir eitt sindur aftanfyri teir báðar fremstu, men seinasta teinin gekk báturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ framúr væl.

Teir endaðu á triðja plássinum, men avrikið kundi bent á, at tað eru møguleikar fyri uppaftur betri úrslitum.

Tað halda teir eisini umborð á Sølmundi. Á Norðoyastevnu vóru teir nummar trý, meðan tað í Hósvík kiksaði fullkomuliga hjá teimum. Ta ferðina hingu teir fastir í startinum og endaðu á tíggjunda plássinum. Sølmundur kendi seg snýttan í startinum, tí teir vórðu sendir frá krókinum, sum teir tvær ferðir uttan trupulleikar høvdu roynt, og til ein krók, sum vísti seg ikki at rigga. Tí hevur Kappróðrarfelagið NSÍ kært tann róðurin til RSF. Kæran skuldi viðgerast í hesi vikuni.

### 6-mannafør, kvinnur

| | |
|---|---|
| 1 Jarnbardur | 05:28.11 |
| 2 Riddarin | 05:33.08 |
| 3 Lómur | 05:35.03 |
| 4 Páll Fangi | 05:42.10 |
| 5 Sølmundur | 05:59.11 |

### 6-mannafør, menn

| | |
|---|---|
| 1 Jarnbardur | 08:00.21 |
| 2 Gongurólvur | 08:02.06 |
| 3 Sølmundur | 08:03.23 |
| 4 Sundabáturin | 08:05.07 |
| 5 Strálan | 08:13.13 |
| 6 Víkingur | 08:15.16 |
| 7 Lómur | 08:18.18 |
| 8 Stjørnan | 08:26.24 |
| 9 Páll Fangi | 08:31.05 |
| 10 Hósvíkingur | 08:37.11 |
| 11 Fuglfirðingur | 08:40.12 |
| 12 Kollfirðingur | 08:49.10 |

## FM-kappróður

| 5-mannafør, dreingir | Stig | jóansøka |
|---|---|---|
| 1 Ritan | 18 | 7 |
| 2 Fípan Fagra | 15 | 5 |
| 3 Sílið | 13 | 2 |
| 4 Drekin | 10 | 4 |
| 5 Blikur | 7 | 3 |
| 6 Tjaldrið | 3 | 1 |

| 6-mannafør, kvinnur | | |
|---|---|---|
| 1 Jarnbardur | 21 | 7 |
| 2 Riddarin | 15 | 5 |
| 3 Lómur | 12 | 4 |
| 4 Páll Fangi | 9 | 3 |
| 5 Sølmundnur | 6 | 2 |
| 6 Gongurólvur | 2 | 0 |

| 5-mannafør, gentur | | |
|---|---|---|
| 1 Blikur | 17 | 7 |
| 2 Drekin | 17 | 5 |
| 3 Tjaldrið | 12 | 3 |
| 4 Tekla | 11 | 4 |
| 5 Erla Kongsdóttir | 3 | 1 |
| 6 Havfrúgvin | 2 | 2 |

| 5-mannafør, kvinnur | | |
|---|---|---|
| 1 Sílið | 21 | 7 |
| 2 Blikur | 14 | 5 |
| 3 Fípan Fagra | 10 | 4 |
| 4 Drekin | 9 | 2 |
| 5 Frúgvin | 7 | 3 |
| 6 Firvaldur | 5 | 1 |

| 6-mannafør, menn | | |
|---|---|---|
| 1 Gongurólvur | 19 | 5 |
| 2 Jarnbardur | 17 | 7 |
| 3 Sundabáturin | 9 | 3 |
| 4 Sølmundur | 8 | 4 |
| 5 Strálan | 7 | 2 |
| 6 Víkingur | 2 | 1 |
| 7 Páll Fangi | 2 | 0 |
| 8 Lómur | 2 | 0 |

| 8-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 Nevið Reyða | 21 | 7 |
| 2 Kvívíkingur | 15 | 5 |
| 3 Argjabáturin | 12 | 4 |
| 4 Ørvur | 9 | 3 |
| 5 Árnfirðingur | 6 | 2 |
| 6 Miðvingur | 3 | 1 |

| 10-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 Eysturoyingur | 19 | 7 |
| 2 Nólsoyingurin | 16 | 4 |
| 3 Hoyvíkingur | 13 | 5 |
| 4 Havnarbáturin | 8 | 3 |
| 5 Vágbingur | 6 | 1 |
| 6 Skálabáturin | 4 | 2 |